# Kaffistovan nú eisini á netinum

**Staðið er kent, tí fyrr var Kaffivognurin har, og hetta var eitt søguligt stað í Havn, har ein fekk sær kaffi og eitt prát á sama stað, har lossingarmenn og onnur savnaðust. Kaffistovan er enn savningarstað í Havn**




Á søguliga staðnum, har Kaffivognurin á sinni stóð, er nýggj kaffistovan reist. Um ein ikki veit tað, so hugsar ein kanska ikki um tað, tí í fyrstu syftu er stílurin nærum hin sami, tá um húsasnið ræður, men broytingar eru.

Húsini eru nýggj, og serligt við teimum er, at olju nýta tey ikki, tí nýggja tøknin, ið nevnist berghiti, verður nýtt.

### Góðska og hugni

Í Kaffistovuni á Eystaru Bryggju í Havn leggja tey dent á góðsku og hugna, og at hetta er eitt andarhol í stórbýnum. Gestirnir fáa góðsku og bestu tænastu.

Í Kaffistovuni fæst morgunmatur, døgurði, og annars kaffi, og tað, ið hartil hoyrur.

### Útleigan

Umframt at vera kaffistova, so eru hetta jú savningarhølir, ið eisini kunnu nýtast til veitslur og líknandi. Og tað verða tey eisini.

Eini 65 fólk rúmast inni, og eru hølini góð og við nú tímans køki eru møguleikarnir nógvir. Og tað hevur eisini víst seg, at áhugin at leiga hølini er stórur, serliga nú til jóla, og royndirnar eru góðar.

### Á netinum

Kaffistovan er nýggj, og er eisini nútímans. So nútímans, at hetta søguliga stað eisini er á netinum við egnari heimasíðu.

Har sæst m.a. matarlepin, so ein kann hyggja, hvat dagsins rættur er.

Eisiin fæst annað at vita, t.d. leiguprísir, eitt sindur av søguligum og ein kann fáa samband við Kaffistovuna. Adressan er www. kaffistovan.fo.

Í kaffistovuni arbeiða 3 fólk, men umframt eru leysir hjálparar, tá á stendur.

*Dagfinn Olsen*




**Berbarur ICOM VHF IC-M71**

Fyrr kr. 3595,00
**Nú kr. 2595,00**

*P/f Jógvan Weihe*

Stiðjagøta 10 • Telefon 35 38 97 • Fax: 35 38 98
jogvan-weihe@jogvan-weihe.fo • www.weihe.fo



**Paraply stólur**
við Cars og Princess
**Einans kr. 398,-**

VØGGAN

Heykavegur 3 | á Hálsi | Tórshavn | Tel. 319088
voggan@post.olivant.fo | www.voggan.fo

Handilsstaðið í Suðuroy

**Snið til tín gerðandisdag**



Torgið Sp/f, Vágsv. 62, Vágur 612096



# Sig tað á jólum ...

**NOKIA 1208**

Ein einføld og snøgg fartelefon til tín, sum ikki krevur meira fjas enn neyðugt.
**Lummalykt – 3 spøl – Mp3 ringitónar**

**395,-**

Tilboðini eru at fáa í Telebúðunum kring landið og eru galdandi til jóla :-)

SENDISTOVAN

FØROYA TELE